Ternan um Lorvíksfjørð

Dúgvan var til umvælingar um vikuskiftið, og tí røkti Ternan siglingina um Lorvíksfjørð

SAMFERÐSLA
y un akst in

Fríggjakvøldið varð Dúgvan tikin úr siglingini um Lorvíksfjørð, og Ternan sett inn ístaðin.

Orsøkin til hetta var, at umvælingar skuldu gerast á motorarnar hjá Dúgvuni. Hetta vóru umvælingar, sum skuldu gerast, tá Dúgvan var í dokk herfyri, men tá komu eykalutirnir ikki til tíðina, og Dúgvan mátti setast inn í sigling aftur.

Nú nýtti Strandferðslan vikuskiftið til at gera hesar umvælingar, og meðan Ternan sigldi um Lorvíksfjørð, røkti Sam siglingina um Vestmannasund.

Strandfaraskipið Barsskor er á sleipistøð, og hevur Súlan røkt siglingina millum Klaksvík og Kalsoynna seinastu tíðina.

Næraberg skift spælmotorar

Næraberg landaði 330 tons av surimi og 195 tons av mjøli í Klaksvík um vikuskiftiðs

Stóri svartkjaftatrolarin mátti bróta túr av, eftir at ein spælmotorur fór

UMVÆLING
y un akst in

Fríggjadagin kom Næraberg til Klaksvíkar, tí ein spælmotorur var farin.

Næraberg fór út beint fyri nýggjárið, og ætlanin var ikki at koma heim júst nú. Men óhappið við spælinum gjørdi tað neyðugt at leggja leiðina heim.

Næraberg lá í Klaksvík um vikuskiftið, og báðir spælmotorarnir vórðu skiftir.

Næraberg legði veiðina, sum hann hevur fingið síðani nýggjárið, upp í Klaksvík, meðan hann varð umvældur. Hann landaði 330 tons av surimi og 195 tons av mjøli.

80 fáa bót

Løgreglan í Suðuroy gjørdi grein 13 kanningar og ferðamátingar í farnu viku

KANNINGAR
y un akst in

Í farnu viku vórðu 340 bilar steðgaðir í Suðuroy, har løgreglan gjørdi umfatandi grein 13 kanningar og ferðamátingar.

80 av hesum bilførarum vórðu skrivaðir upp av løgregluni.

Í flestu førum var talan um smærri brot á lógina – bilførarar høvdu ikki koyrikoyrtið uppi á sær, teir høvdu ikki fest trygdarbelti, og onkur koyrdi uttan koyriljós.

Nakrir bilførarar fáa bót fyri at hava koyrt ov skjótt – millum annað ein, sum koyrdi 81 í bygdum øki.

Kanningarnar hjá løgregluni í Suðuroy fóru fram ymsastaðni í oynni.

Gramex fyrireikar útgjald

Føroyskir tónleikaútgevarar skulu nú lata Gramex-grunninum upplýsingar um útgávur í farna ári

GRAMEX
y un akst in

Tey, sum góvu fløgur út í fjør, skulu nú lata útgávufelagnum Gramex upplýsingar um útgávurnar fyri at fáa pengar frá grunninum

Framleiðslufelagið Gramex biður nú føroyskar tónleikaútgevarar senda sær upplýsingar um útgávur í farna ári, tí grunnurin skal gjalda útgevarunum pengar fyri útgávurnar.

Føroysku loftmiðlarnar gjalda Gramex eitt ávíst gjald fyri tónleikin, sum teir spæla, og pengarnir frá hesum gjaldi verða síðani býttir út í Føroyum.

Føroysk Tónaskøld fáa part av pengunum, og útgevararnir fáa part.

Øll tey, sum hava givið tónleik út í 2000, kunnu fáa pengar frá Gramex – eisini um talan er um einstaklingar, sum hava staðið fyri fløguútgávum.

Tíðarfreist skal haldast

Gramex krevur skjøl sum vátta, hvussu nógvar eindir hvør útgevari hevur framleitt í farna ári, og útgjaldið úr grunninum verður síðani ásett eftir hesari uppgerð.

Hvørt ár eru tað útgevarar, sum ikki halda tíðarfreistina, sum Gramex setir fyri at lata grunninum upplýsingar, og tey, sum koma ov seint við sínum skjølum, fáa ongar pengar úr grunninum.

Tí leggur Gramex dent á, at tíðarfreistin, sum er sett til 1. februar, verður hildin.

Gramex roknar við, at millum 30 og 40.000 eindir vóru framleiddar við føroyskum tónleiki í farna ári, og allar hesar eindir hava rætt til gjald frá Gramex.

Eisini endurútgávur av føroyskum tónleiki hava rætt til útgjald, men grunnurin umhugsar at broyta hesar reglur, tí ætlanin við grunninum er stuðla undir útgávuna av nýggjum føroyskum tónleiki.

Hetta skal tó viðgerast og viðmælast á aðalfundi í felagnum.

Føroyskir listamenn á danskari listastevnu

Fimm føroyskir listamenn stilla um vikuskiftið út í Herning Kongress Center, har stór listastevna verður hildin

Fimm føroyskir listamenn verða um vikuskiftið við á stórari danskari listastevnu í Herning

LIST
y un akst in

Um vikuskiftið verður stór árlig listastevna í Herning. Talan er um ein hálvárliga stevnu, sum skiftir millum Herning og Keypmannahavn.

Fimm føroyskir listamenn verða við á stevnuni í Herning, og teir eru Amariel Norðoy, Øssur Mohr, Eyðun av Reyni, Kári Svensson og Hanni Bjartalíð

Tað er eitt felag við donskum gallaríum, sum stendur fyri framsýningini, og fleiri enn 100 gallarí eru við. Flestu teirra eru donsk, men okkurt er eisini úr Svøríki.

Hjá ymsum útstillarum

Gallaríini hava egnan bás, har tey so sýna fram nakrar listamenn, sum tey vilja hava við.

Amariel og Øssur stilla út hjá Skt. Gertrud, Hanni og Kári hjá Galleri Rasmus og Eyðun hjá Galleri Torso.

Í fjør vitjaðu eini 15.000 fólk á stevnuni í Herning, og fólk keypa nógva lista hesar dagarnar, tá stevnan er.

Art Kunstmesse í Herning letur upp fríggjadagin og er opin til sunnudagin.

Latið vinnuna avgera hvar oljuhavnin skal vera

– Vit mugu læra okkum at halda labbarnar vekk, tí vit hava brent fingrarnar so oftani, tá politikarar eru farnir at spæla vinnulívsmenn og fortelja vinnulívsmonnum, hvat teir skulu gera. Latið vinnuna gera av, hvar útgerðarhavnin skal vera sigur nýggi borgarstjórin í Havn, Jan Christiansen

ÚTGERÐARHAVN
an r

Jan Christiansen, borgarstjóri bjóðar oljuvinnuni Viðarnes til útgerðarhavn

Mynd Álvur Haraldsen

Tað er ein sera avgjørdur Jan Christiansen, nýbakaður borgarstjóri í Tórshavnar Kommunu, sum úttalar seg, tá blaðið biðjur hann um eina viðmerking til spurningin um, hvar komandi oljuútgerðarhavnin skal vera. – Síggi at blaðið hevur samrøðu við eitt umboð hjá Texaco, sum heldur Runavík vera besta plássið til útgerðarhavn. Dugi ikki at síggja, hví man skal spyrja eitt felag, sum dumpaði í loyvisumfarinum er hansara fyrsta viðmerking. – Hví man skal spyrja eitt felag, sum ikki var gott nokk til at fáa loyvi. Og tá Allan Jones frá Texaco sigur, at tað er ein trupulleiki at leggja oljuútgerðarhavnina í Havn, tí tað m.a. er so nógv handilsligt virksemi í núverandi havn sum er so spyr Jan Christiansen, hví man tá leggur eina útgerðarhavn í Aberdeen, har tað eisini er nógv handilsligt virksemi! Og tá tosað verður um týdningin við baklandinum, so heldur hann, at tað er einki stað sum í tænastum o.ø. hevur eitt betri bakland enn júst Havnin. Hann vísir eisini á, at nógv pláss er tøkt á Sundi og kann goymslupláss eisini útbyggjast har umframt at stór goymsluhøli eru á Sandvíkahjalla.

Borgarstjórin í Havn dylur ikki yvir, at Havnin fegin vil bjóða seg fram til at hýsa oljuútgerðarhavnini. Og tá tosað verður um, at tað ikki er liggjandi allar dagar á Sundi ella á Drelnesi, so er tað so eitt. Men í havnini í Tórshavn, sum hann metir sum ta bestu havnina í landinum, er liggjandi allar 365 dagar í árinum. Annars vísir hann á, at ein stór úrgerðarhavn sum Peterhead eisini kann vera stongd vegna veður. Hvat viðvíkur trýsti á húsamarknaðinum, barnagarðsøkinum osfr., sum kann standast av hesum virkseminum, so sær Jan Christiansen tað ikki sum nakran stóra trupulleika. Hann heldur, at býurin megnar at taka móti nógvum virksemi, uttan at tað skal nerva alt annað. – Vit eru nógv minni »følsom fyri útsvingum« enn tey smærri plássini. Hann dugir tó at síggja trupulleikar við, at alt virksemi verður lagt í miðstaðarøkinum. Men hann ávarar ímóti politiskt at fara inn og broyta ella seta seg upp ímóti tí búskaparligu gongd, sum náttúrliga fer fram.

Latið vinnuna bestemma

Jan Christiansen heldur tað annars vera rætt at lata oljuvinnuna sjálva gera av, hvar oljuútgerðarhavnin skal liggja. – Vil hon hava, at útgerðarhavn skal vera í Runavík, so er tað í lagi, vil hon hava, at hon skal liggja í Havn, so er tað eisini í lagi. Tað vit vita er, at oljuvinnan hevur vrakað Drelnes, og eg skilji ikki, hví eitt nú man skal blíva við at taka Suðuroynna fram. Tað mest óhepna við øllum orðaskiftinum um oljuvinnu er hetta, at politikkur kemur uppí, og at tað næstan bara verður fokuserað uppá Suðuroynna.

-Eg eri eingin serfrøðingur á økinum, og tað er kanska heldur eingin føroyingur, sum er tað. Vit hava fingið eitt signal frá oljuvinnuni, har hon biðjur okkum lata vera við at gera nakrar stórar íløgur í útgerðarvirksemi. Hetta er tað, sum aðrir hava brent seg uppá. Sjálvur haldi eg, at vit hava dugað væl at lurtað eftir hesum signalum, tí ongar desideraðar íløgur eru gjørdar í útgerðarvirksemi enn.

Jan Christiansen heldur tað tí vera skeivt av politikarunum at leggja seg út í búskaparligu fyritreytirnar, sum eru til. – Eg skilji væl, at Tvøroyri, Havnin og Runavík bjóða seg fram. Tað finnast dugnalig fólk á øllum plássum. Sjálvandi skulu vit vísa okkum fram men latið so oljuvinnuna finna út av, hvar virksemið skal vera, antin tað eitur Drelnes, Tórshavn ella Runavík. Borgarstjórin í Havn heldur ikki, at politikarar tað verið seg í Suðuroy, Havn ella í Eysturoynni eiga at leggja trýst á oljuvinnuna fyri at fáa hana at leggja útgerðarhavnina eitt ávíst stað. – Tá fær man bara tað næstbesta produktið. Tá fær tú ikki tað, sum oljuvinnan vil og tú fær ikki eina so rationella, effektiva og góða oljuútgerðahavn, sum man annars kundi fingið, tí man hevur lagt seg politiskt út í hetta.

Jan Christiansen sigur víðari, at siga vit t.d. politiskt, at oljuvinnan skal liggja í Sandoynni, so vilja oljufeløgini góðtaka tað, men so mugu vit gjalda tað hetta kostar. – Vit mugu læra okkum at halda labbarnar vekk, tí vit hava brent fingrarnar so oftani, tá politikarar eru farnir at spæla vinnulívsmenn og fortelja vinnulívsmonnum, hvat teir skulu gera. Tað er munur á at vera politikari og vinnulívsmaður. Vilja politikarar vera vinnulívsmenn, so verði vinnulívsmenn og sleppi politikkinum.

Borgarstjórin í Havn vónar annars, at oljufeløgini verða før fyri at peika út rætta øki til útgerðarhavn, eisini út frá hvørji fólk og feløg eru við í hesum arbeiðinum. – Eg havi einki ímóti, at suðuroyingar fingu útgerðarhavnina, men so skuldi tað verið frítt og uppá handilsligar fortreytir. Jan Christiansen bjóðar oljuútgerðarhavnini vælkomnari til høvuðsstaðin, og verður gjørt av at leggja hana her, so vil kommunan gera tað hon er ment fyri, at henda nýggja vinnan kann kenna seg væl her.

ÚTSØLA

Myrkamorreyð kot
v/lynlási
Millenniumtroyggjur
+ troyggur
við høgum hálsi

÷30%

• Stórt úrval av áteknaðum dúkum
• Stramajkoddar **1/2 prís**
• Restir av brodarítoy
– nógv niðursett
• Frátikið tógv, ymisk sløg **1/2 prís**

Tógvhandilin IGLOO

Sosialurin - Tel. 311820

Sverrisgøta 19 • 100 Tórshavn • Tel. 315264 • Fax 319623